UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **4. februar 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-117**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-74/2020 frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52 a. Fyrispurningur viðvíkjandi radara, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu ofta og nær hevur Jenis av Rana, landsstýrismaður, tosað við danska verjumálaráðharran, Trine Bramsen, um møguliga uppseting av hernaðarradara í Føroyum – antin á vanligum fundi, teldufundi ella gjøgnum telefon?
2. Hvat hevur landsstýrismaðurin fingið at vita frá danska verjumálaráðharranum um møguliga uppseting av hernaðarligum radara í Føroyum?
3. Hvat hevur landsstýrismaðurin sagt við danska verjumálaráðharran um møguliga uppseting av hernaðarligum radara í Føroyum?
4. Nær ætlar landsstýrismaðurin at ráðføra seg við Uttanlandsnevndina um málið viðvíkjandi møguligari uppseting av einum hernaðarligum radara í Føroyum?
5. Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at tað samsvarar við § 54 stk. 2 í stýrisskipanarlógini, at hann framvegis ikki hevur ráðført seg við Uttanlandsnevndina um hetta stórmál, hóast hann, gjøgnum langa tíð og fleiri ferðir hevur tosað við donsku stjórnina um møguliga uppseting av einum hernaðarradara í Føroyum?
6. Fer landsstýrismaðurin at loyva danska verjumálaráðharranum og fólki hennara at geva Uttanlandsnevndini ta kunning, tey kunnu geva, um møguliga uppseting av einum hernaðarligum radara í Føroyum?

Svar

Til 1: Á telefonfundi 6. august 2020, á fundi í Keypmannahavn 8. september 2020, og á videofundum 13. november 2020 og 19. januar 2021 er spurningurin um ætlaða Arktis-kapasitetspakkan hjá donsku verjuni umrøddur við danska verjumálaráðharran. Ætlanin um ein nýggja hernaðarradara í Føroyum er partur av sonevnda Arktis-kapasitetspakkanum.

Til 2: Danski verjumálaráðharrin hevur upplýst, at tørvur er á betri radaraeftirliti í loftrúminum yvir føroyskum øki, serliga í einum geira sum fevnir frá økinum í ein landnyrðing úr Føroyum millum Ísland og Noreg í ein útsynning móti Bretlandi. Bæði NATO og USA hava eisini gjørt vart við tørvin á betri loftradaraeftirliti í nevnda øki, sum eftirlit ikki hevur verið við síðan táverandi hernaðarradarin á Sornfelli var tikin niður

í 2009. Tí hevur spurningurin um møguleikan fyri nýggjum radara í Føroyum verið partur av umrøðuni í sambandi við Arktis-kapasitetspakkan hjá donsku stjórnini.

Til fyri fáum døgum síðani hevur talan ikki verið um ein ítøkiligan fyrispurning, men kunning um, at helst fór ein radari at vera millum ynskini hjá donsku verjuni.

Til 3: Landsstýrismaðurin hevur sagt, at talan er um eitt mál, sum skal viðgerast í Føroyum, áðrenn avgerð verður tikin. Hann hevur sagt sítt útgangsstøði vera, at Føroyar sum eitt vesturlendskt fólkaræði eiga at gera sítt til felags verjuna í NATO, tá ið tørvur er á tí.

Til 4: Landsstýrið hevur nýliga fingið ítøkiligan fyrispurning frá donsku stjórnini um støðu sína til spurningin um uppsetan av einum møguligum hernaðarradara í Føroyum. Málið verður nú fyrireikað til politiska viðgerð, bæði í landsstýrinum og í Uttanlandsnevndini. Talan er um eitt mál, sum skal hava neyva politiska viðgerð í Føroyum, áðrenn avgerð verður tikin.

Til 5: Eftir § 54 í stýrisskipanarlógini skal landsstýrið ráðføra seg við Uttanlandsnevndina, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanríkispolitiskan týdning, og eftir stk. 2 í somu grein skal landsstýrið ráðføra seg við Uttanlandsnevndina í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar um mál av stórum týdningi fyri viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Málið um hernaðarradara hevur bæði uttanríkispolitiskan týdning og týdning fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum. Tí verður eingin avgerð tikin, fyrr enn ráðførsla hevur verið við Uttanlandsnevndina um málið, ið sum nevnt nú verður fyrireikað til politiska viðgerð. Enn hevur samskiftið millum donsku stjórnina og landsstýrið verið at rokna sum kunning í sambandi við, at spurningurin um ein møguligan radara hevur verið í umbúnað, ikki sum ítøkiligar samráðingar ella støðutakan. Tí hevur higartil verið ov tíðliga at biðja um ráðførslu við Uttanlandsnevndina.

Til 6: Talan er um mál millum landsstýrið aðrumegin og donsku stjórnina hinumegin. Tað er landsstýrið, ið skal ráðføra seg við Uttanlandsnevndina um málið, og tað er landsstýrismaðurin, sum stendur til svars fyri Uttanlandsnevndini í málinum. Ein ráðførsla skal sjálvandi fara fram á fult upplýstum grundarlagi. Tí hevur landsstýrið biðið donsku stjórnina um allar viðkomandi upplýsingar um málið.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður